

*Gulin og Funningslaks økja um virksemi*

*Gulin og Funningslaks økja um virksemi:*

# Flakavirkið á Strondum verður kryvjivirkið

*Um nakrar mánaðir verður flakavirkið á Strondum latið upp aftur, men hesaferð verður tað ikki sum vanligt flakarvikrið. P/F Gulin og P/F Funningslaks eru í felag farnir at gera kryvjivirkið á Strondum*

Sveinur Tróndarson

Tað gongur av álvara framá í alivinnuni og tað sæst aftur á virkseminum í vinnuni. Alifyritøkurnar gerast alsamt størri, og tað tað er ikki bara tí, at aliringarnir gerast fleiri. Harafturímóti er tað tí, at alifyritøkurnar leggja seg eftir meira fjølbroyttum virksemi, soleiðis at tær standa meira á egnum beinum.

Soleiðis er eisini tá talan er um P/F Gulan og P/F Funningslaks.

Um nakrar mánaðir lata hesar báðar alifyritøkurnar, sum eru í tøttum samstarvi upp kryvjivirkið í gamla flakarvirkinum á Strondum.

**Keyptu fyri eina mió**

Fyri góðum hálvum øðrum ári síðani keyptu hesar báðar fyritøkurnar gamla flakarvirkið á Strondum fyri eina millión krónur frá Føroya Banka.

Kári Nielsen, stjóri í Funningslaks sigur við Sosialin, at tað var ein prísur, sum svaraðir til tað sum virkið var vert.

- Tað var í sera ringum standi tá vit yvirtóku tað. Takið var beinleiðis lívshættisligt at stíga á, og restin var ikki stórt mætari. So prísurin mundi vera á eini góðari leið, sigur hann.

Síðani tá er virkið umvælt og tá alt umvælingararbeiðið er liðugt metir Kári at samlaði kostnaðurin er fýra milliónir. Men tá eru ongar maskinur íroknaðar.

Hvussu nógv tær koma at kosta dugir hann ikki at siga í løtuni, tí tilboðini upp á maskinurnar eru nústaðni ávegis.

**Arbeiði til 15-20 fólk**

Tá virksemið fer í gongd á nýggja virkinum á Strondum væntar Kári, at tað verður arbeiðið til millum 15 og 20 fólk.

- Virkið klárar at framleiða 5-6000 tons og tað ætla vit okkum at klára, sigur Kári.

Tá vit spyrja um tað er ætlanin at arbeitt skal verða hvønn dag sigur hann, at tað er ikki rættuliga greitt í verandi løtu.

- Men tað fer at vera har á leið. Verður tað fyrireikað við skili, so verður arbeiði hvønn dag, sigur Kári

Virkið á strondum skal arbeiða fisk frá báðum alibrúkunum. Funningslaks framleiðir umleiðir 3000 tons í Funningsfirði, meðan Gulin framleiðir upp ímóti 2000 tonsum í ringunum, sum liggja við Argjalandi. Restin upp til tey 6000 tonsini mugu teir so útvega sær aðrastaðni frá.

**Fyrsta byggistig**

Fyri ikki soi langari tíð síðani tók East Salmon í Norðoyggjum í brúk nýtt góðskingarvirkið í Fuglafirði. Tí spurdu vit Kára Nielsen, um teir eisini hava í hyggju at fara undir góðskingarvirksemi á Strondum, og um hølini rúma tí møguleikanum.

- Møguleikin er til staðar, tí hølini eru nóg stór til tað, men tað er ikki nakað sum liggur beint fyri framman. Eg haldi, at tað er skeivt av okkum at fara undir tað virksemi júst nú. Eg haldi, at vit eiga at bíða eftir teimum royndum, sum teir gera sær í Fuglafirði áðrenn vit kasta okkum út í slíkt.

Men tað er kanska nakað tit hava hugsað um?

- Vit hava hugsað um tað, men tað verður sum sagt ikki fyribils. Innfrysting er kanska tað, sum liggur fyrst fyri framman, men nær tað verður fært tú meg einki at siga um enn, sigur Kári.

Kortini er lítið at ivast í, at strandingar fegnast um at lív aftur kemur í gamla flakarvirkisbygningin, sum av fyrstun tíð kallaðist Bátafisk.

**Prísurin høgur**

Sum greitt frá, kostar ein slík íløga sum henda rættiliga fitt av peningi, og tískil skulu nakrar krónur í kassan, fyri at tað fíggjarliga kann bera seg.

Men útlitini til tað eru góð í løtuni, sigur Bogi Jacobsen, sum er stjóri í P/F Gulin.

- Prísurin er um 28 krónur fyri kilo – til alaran – og tað er væl omanfyri tað sum vit vanliga kalla fyri miðalprís. Hann hevur ligið um 23 so løtan er røtt at fara undir hetta heldur Bogi.

Tí skuldu fíggjarligu útlitini fyri býggja virkinum verið í lagið.

# Samstarvið gagnar øllum pørtum

*Nýggja kryvjivirkið á Strondum er eitt dømi um, hvussu virkir innan somu vinnugrein kunnu fáa meira burtur úr samstarvið enn úr kapping. Men tað er heldur ikki fyrstu ferð, at Gulin og Funningslaks samstarva*



*Nólsoyar bygd: Samstarvið gagnar øllum*

Sveinur Tróndarson

Tað byrjaði við samstarvið um Nólsoyar Alistøð og nú heldur tað fram við samstarvinum um kryvjivirkið inni á Strondum.

Ein sólskinssøga um samstarv millum tvær alifyritøkur, sum sjálvar eru rættiliga nýggjar á marknaðinum.

Gulin, sum varð stovnað í 1993, men sum kortini hevur eina søgu, sum røkkur aftur til 1986 og Funningslaks, sum varð stovnað í 1994.

**Landalistøð í Nólsoy**

Virksemið byrjaði sum sagt við Nólsoyar Alistøð, sum er ein landalistøð. Eins og á Strondum er tað gamli flakavirkisbygningurin, sum fyri ein bíligan penga varð keyptur, og síðani settur í stand, sum er karmur um virksemið.

Har úti ala teir fisk í tveimum stórum kørum, men hann gongur bara har úti eina lutfalsliga stutta, men fyri fiskin sera týdningarmikla tíð.

- Smoltið verður, tá tað er um 50 gram til støddar flutt úr Svínoy út til Nólsoyar, har tað gongur í hitaðum sjógvi til tað er 150 gram ella har á leið. Av tí at tað er í heitari vatni kemur tað skjótari fyri seg og tí er fiskurin betri fyri at seta út enn hann annars vildi havt verið, sigur Bogi Jacobsen.

Hetta sæst aftur á rakstrinum, tí er fiskurin størri er hann meira mótsøðufØrur og umframt tað veksur hann eisini skjótari. Tískil kann hann takast skjótari, og tað gevur fleiri krónur í kassan, samstundis, sum fóðurnýtslan fellur.

**Samstarvið virkar væl**

Fiskurin, sum gongur í kørunum í Nólsoy, verður fluttur til alistøðirnar í Funningsfirði og við Argjalandi, og har gongur hann til hann skal takast.

Samstarvið hevur virkað stak væl sigur Bogi Jacobsen, og tað er orsøkin til at fyritøkurnar nú víðka um samstarvið við virkinum á Strondum.

Um tað so fer at geva seg aftur í uppaftur størri og tættari samstarvið ber ikki til at siga í løtuni, siga teir báðir Bogi Jacobsen og Kári Nielsen..





# Spjaða seg sum ringar í sjónum

***Bakgrund:** Tað byrjaði fyri nógvum árum síðani úti í Svínoy. Nú er virksemið spjatt til høvuðsstaðin, Nólsoynna, Funningsfjørð og um stutta tíð eisini inn á Strendur*

Sveinur Tróndarson

Hóast partafelagið Gulin ikki varð stovnað fyrr enn í 1993, so byrjar virksemið felagsins longu sjey ár frammanundan.

Tá setti Bjarni Jacobsen á at gera eina smoltstøð úti í Svínoy, og hóast tað fyri mong kanska kundi tykjast óðamannaverk at fara undir slíkt virksemið í útjaðaranum, so hevur tíðin víst, at hetta kann lata seg gera uttan stórvegis trupulleikar.

- Tað er kanska eitt sindur avsíðis, men krøvini eru ikki so stór, tí tað eru avmarkaðar fóðurnøgdir, sum vera nýttar, og smoltið verður avskipað so sjáldan, sigur bogi Jacobsen, um plaseringina.

Harafturímóti eru tað ávísir fyrimunir við at hava smoltstøðina har hon liggur nú, tí av tí at hon er so avbyrgd, er hon eisini rættiliga avbyrgd frá eitt nú smittukeldurm.

- Tað er ein avgjørdur fyrimunur, sigur Bogi Jacobsen, sum saman við pápanum og bróðrinum eigur P/F Gulin.

**Alistøð í Havn**

Hóast smoltstøðin liggur úti í Svínoy, so valdi Bogi sjálvur at fara undir alivirksemi fram við Argjalandinum. Tað er rættuliga langt frá Svínoynni, men tað er ikki nøkur beinleiðis forðing.

Tað var í 1993, at alistøðin í Havn varð tikin í nýtslu, og longu árið eftir vóru smoltstøðin og alistøðin løgd undir eitt partafelag og tað var Gulin, sum helt fram.

Bogi Jacobsen greiðir frá, at av tí, at teir fóru so seint í gongd vórðu teir ikki raktir av kreppuni, og tískil hava teir kunna rikið sítt virksemið rættiliga ótarnaðir í so máta.

Síðani samanleggingina hevur Gulin verið meira úti um seg og millum annað eru teir partaeigarar i P/F Funningslaks, sum teir eisini samstarva nógv ið.

**Brunnbát, landaling og kryvjing**

Tá P/F Gulin yvirtók smoltsøðina úti í Svínoy var tað ikki bara talan um eina smoltstøð, tí saman við henni yvirtók felagið eisini brunnbátin Dragaberg, sum eigararnir av smoltstøðini lótu byggja á Tórshavnar Skipasmiðju í 1990.

Hesin bátur verður nú brúktur til allan flutning hjá felagnum til og úr Svínoy og hann verður eisini brúktur til flutningin millum landalistøðina í Nólsoy og alistøðirnar hjá Funningslaks og Gulanum.

Virksemið er heldur ikki steðga har, tí í 1998 fór Gulin, saman við Funningslaks í gongd við landalistøðina í Nólsoy, og um fáar mánaðir letur upp nýtt kryvjivirkið á Strondum.

**Smáplássini fáa gleðina**

Við tí vanda at stíga onkran stranding á tærnar loyva vit okkum at siga, at tað eru smáplássini, sum hava fingið fyrimunin tá Gulin hevur vaksið um virksemið sítt.

Svínoyggin, sum er heimstaðurin hjá familjuni aftanfyri Gulan hevur smoltsøðina og Nólsoyggin fekk landalistøðina. Tá teir fóru upp í Funningslaks var tað á Funningsfirði og nú fara teir undir virksemi á Strondum, sum so eisini er størsta plássið teir virka á, aftaná høvuðsstaðin sjálvandi.

Í Svínoy er Gulin størsta arbeiðsplássi og á Strondum fer tað eisini at tátta væl í, at kryvjivirkið verður størsta arbeiðspláss í bygdini.

**Nú verður steðga á**

Nú P/F Gulin hevur alt virksemið frá smoltstøð til krvyjivirkið spurdu vit stjóran um teir ikki eisini fara undir góðskingarvirkið, fyri at fáa allan ágóðan av framleiðsluni sjálvir.

- Nei, ikki fyribils í hvussu er. Nú steðga vit á eina løtu fyri at síggja hvussu eitt nú East Salmon fer at klára seg við virkinum í Fuglafirði, sigur Bogi Jacobsen, stjóri, sum ikki heldur at teir hava skund í so máta.

Men tað er nú heldur ikki allur sannleikin, tí í løtuni er ivasamt um tað loysir seg at gera stórar íløgur í eitt góðskingarvirkið, greiðir Bogi frá.

- Meginparturin av fiskinum verður í løtuni sendur feskur óvirkaður av landinum tí prísurin er so einastandandi góður, at vit høvdu fingið lítið meira burturúr um vit góðsakaðu hann meira. Tí gera vit tað í løtuni, sigur Bogi

Og við tí prísininum, sum marknaðurin bjóðar í lø'tuni, so undrast eingin yvir tað heldur.

- Vanligi prísurin liggur um 23 krónur fyri kilo til alaran, men í løtuni er hann fimm krónur hgri enn tað, og tað gevur ikki so lítið tá ein hugsar um, hvussu nógv vit framleiða, sigur Bogi.

Tí hevur Gulin valt at steðga á fyribils og hyggja eftir hvat tað er framtíðin hevur at bjóða. Seinastu tíðina hava fetini verið stór, og tíðin er kanska komin til at taka smærri fet eina tíð.

Vit ynskja teimum góðan byr kortini.

## P/F Gulin

100 Tórshavn

Eginpeningur um 8 mió krónur við árslok 1999

Stovnað í 1993, stjóri Bogi Jacobsen

1986 Smoltstøðin í Svínoy byrjar sítt virksemi

1990 Dragaberg, 60 kubik brunnbátur, verður bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju

1993 Farið verður undir alivirksemið við støðini við Argjalandi

1994 Eru við til at stovna P/F Funningslaks í Elduvík

1998 Stovna, saman við P/F Funningslaks, Nólsoyar Alistøð, sum er ein landalistøð

2000 Gera kryvjivirkið í gamla flakarvirkinum á Strondum

# Heppin í óhappinum

*Bilførari var heppin í óhappinum, tá bilurin hann misti tamarhaldi á rendi í ein parkeraðan bil*

Sveinur Tróndarson

Eitt ferðsluóhapp hendi á Bíggjarvegnum um vikuskiftið. Bilurin var á veg inn móti Sørvági tá bilførarin misti tamarhaldi á bilinum.

Bilurin hevði kós oman av vegnum, men hann rendi í staðin á ein annan bil, sum stóð parkeraður í niðara borði á Bíggjarvegnum.

Í so máta má sigast at hepni var við bilføraranum, tí fór hann út av vegnum, kundi stórskaði staðist av óhappinum, sigur løgreglan í Vágum.

Eingin fólkaskaði stóðst av óhappinum, men báðir bilarnir fingu skaða. Bilurin sum rendi á, fekk rættiliga stóran skaða, skilja vit á løgregluni.

# Til hendurs umborð

*Løgreglan í Havn varð boðsend, tá tveir mans vóru farnir til hendurs umborða á Suderøy, sum lá á Havnini*

Sveinur Tróndarson

Tað er ikki bara á landi, at fólk fara til hendurs.

Hóskvøldið fekk løgreglan í Havn boð um at koma oman á Suderøy, sum lá við bryggju í Havn. Har vóru tveir mans - ein føroyingur og ein norðmaður farnir til hendurs.

Súni Vinther, støðleiðari sigur, at norðmaðurin varð fluttur á skaðastovuna við snuddum.

Av tí at skipið er norskt, ger løgreglan í Føroyum ikki meira við málið enn at gera eina frágreiðing, sum verður send norsku løgregluni um málið verður meldað.

Suderøy lá á Havnini tí skipið var tikið fyri at fiska innanfyri.